**Dagur:** 14. juni 2004
**Skrátal:** 44202/2
**Máltal:** 040436/2

**Handilsskúlin**

**Lærugreinakunngerð** **9. juni 2004**

# Miðlakunnleiki C

**Endamálið**

**1.** Endamálið er, at næmingurin skal
1) fáa grundleggjandi ástøðiliga vitan um fjølmiðla- og samskiftissøgu
2) duga at greina og tulka ymisk miðlafyribrigdi og at meta um hesi í breiðum høpi
3) duga at samantvinna ástøðiliga og verkliga vitan um miðlaframleiðslu
4) arbeiða við at leggja til rættis, framleiða og eftirmeta fjølmiðlatilfar
5) gerast tilvitandi um, hvussu fjølmiðlar verða nýttar í ymiskum høpi
6) duga at skipa eina framløgu við hjálp av ymiskari miðlatøkni.

**Undirvísingin**

**2.1** Næmingurin skal arbeiða ástøðiliga eins og verkliga við miðlum, og arbeiðið skal vera javnt býtt millum báðar tættirnar.

**2.2** Í ástøðiliga partinum verður arbeitt við tilfari um sjónvarp, útvarp, film og prentmiðlar (bløð, vikubløð, tíðarrit). Serligur dentur verður lagdur á sjónvarpsmiðilin.

**2.3** Í verkliga partinum verður arbeitt við framleiðslu av skrivaðum tíðindaflutningi, ljóð/dias-framløgu, útvarpssending, video og filmi.

**2.4** Næmingarnir gera í minsta lagi tvær verkligar og tvær ástøðiligar verkætlanir. Onnur verkætlanin er partur av próvtøkupensum.

**2.5** KT er innfeldur partur av undirvísingini

**2.6** Lisnar verða umleið 250 síður av ástøðiligum tilfari.

**Innihaldið í undirvísingini**

**3.1** *Samskiftissøga*
Dentur verður lagdur á nýggjaru fjølmiðlarnar, so næmingarnir fáa kunnleika til dagsins fjølmiðlaheim, her í millum miðlanýtslu vinnulívsins.

**3.2** *Stovnsgreining*
Næmingarnir skulu greina eina miðlafyritøku, t.d. eitt blað, eina útvarpsstøð, eina sjónvarpsstøð ella ein filmsframleiðara. Í hesum sambandi verður m.a. arbeitt við at greina og lýsa støðu miðlastovnsins á marknaðinum, eitt nú við atliti at tilfarinum, sum miðilin serliga leggur dent á at bera fram.


MENTAMÁLARÁÐIÐ • HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • MMR@MMR.FO

**3.3.** *Miðlagreining*
Næmingarnir arbeiða við at greina ymiskar fjølmiðlar við serligum atliti at teirri vali av tilfari, og hvørjar avleiðingar valið hevur. Arbeitt verður eisini við at greina arbeiðshættirnar, sum teir ymsu fjølmiðlarnir nýta í gerandisdegnum.

**3.4.** *Verkætlan*
Arbeitt verður í smærri bólkum, sum fevna um í mesta lagi 4 næmingar, við at gera fjølmiðlaframleiðslu. Framleiðslan tekur støði í ástøðiligum tilfari eins og í gjøgnumarbeiddari og niðurskrivaðari arbeiðsætlan.

**3.5.** *Framløga*
Arbeitt verður við at skipa fyri ymiskum framløgum um ymisk evni, so einstaki næmingurin fær ítøkiligt innlit í, hvussu ymiskar framløguhættir egna sær til ymisk endamál. Samskiftisfrymilin verður gjøgnumgingin.

**3.6** *Valevni*
Í seinnu helvt av undirvísingargongdini verður arbeitt við einum evni, ið er grundfest í greining av miðlatekstum. Tekstirnir verða valdir út frá t.d. tekstaslagi, endamáli, evni, ella framleiðara. Endamálið er at geva næminginum neyvt innlit í ávíst evni.

**Próvtøkan**

**4.** Hildin verður ein munnlig próvtøka, ið er í tveimum: ein bólkapróvtøka í einari verkætlan, og ein einstaklingapróvtøka í einum ástøðiligum evni.

**5.1.** Fyri næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, er próvtøkupensum umleið 150 síður. Próvtøkupensum skal fevna um tær ástøðiligu undirvísingargongdirnar og teir tekstirnar, ið eru nýttir í verkligu undirvísingargongdunum, sum flokkurin hevur arbeitt við. Ástøðiligar bókmentir, ið eru nýttar í sambandi við verkligu undirvísingargongdirnar, eru partar av próvtøkupensum.

**5.2** Fyri sjálvlesandi og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum.

**5.3.** Próvtøkan verður skipað í tveimum.
a) Fyrst verður bólkaframløga av verkætlanini, sum einstaki bólkurin hevur arbeitt við. Í framløguni, ið varir umleið 25 minuttir, greiðir bólkurin við støði í verkætlanini frá m.a. hugskoti, innihaldi og vali av framløguhætti. Hvør bólkalimur hevur ábyrgd av ávísum parti av framløguni.
b) Síðani verður einstaklingapróvtøka, ið varir umleið 25 minuttir, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 2,5 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming. Einstaklingapróvtøkan tekur støði í einum ástøðiligum spurningi við tilhoyrandi ókendum tilfari. Undir próvhoyringini er tað loyvt próvtakaranum at styðja seg til próvtøkuspurningin og tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, umframt til uppskriftir gjørdar í fyrireikingartíðini, men eitt beinleiðis handrit til upplestur telur ikki uppeftir í dømingini.

**5.4** Til próvtøkuna er tað loyvt próvtakaranum at hava við sær allar bøkur og annað tilfar, ið er partur av prótøkupensum, umframt egnar uppskriftir.

**5.5** Í dømingini av bólkaavrikinum verður dentur lagdur á, at næmingarnir greitt duga at lýsa egna framleiðslu við støði í ástøðiligum og miðlatekniskum umráðingum. Í dømingini verður dentur lagdur á, at próvtakarin hevur hollan kunnleika til høvuðsøkini í lærugreinini, og at hann dugur at greina útflýggjaða tilfarið og nýta tey hugtøk, ið eru knýtt at henni.

**6.** Givið verður 1 próvtal fyri samlaða avrikið, har bólkaframløgan telur umleið 1/3 og eintstaklingaframløgan umleið 2/3. Próvtalið verður ásett við støði í einari heldarmeting.